# TIPS

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos



Galerie Focus
14.000 kr.

## Eyðun ynskir sær ...

... ein av málningunum í røðini »Útróðrarbørn, sálmar lívsins« av Amariel Norðoy. Olja/akryl á lørift, 80x100 cm

... nýggja krimisøgan »Panserhjerte« hjá Jo Nesbø.






Rit og Rák
276 kr.

## Rigmor ynskir sær ...

... eitt slættijarn, tí tað, sum eg havi, er so gamalt og slitið. GHD-jørninieru hundadýr, so onkur annar keypa mær tað, tí eg unni mær so illa at brúka so nógvar pengar til eitt slættijarn. Men tey eru forbankað lekkur.

... ring frá íslendsku Sif Jacobs. Tá eg sá hendan ringin í glasskápinum hjá Klivanum var tað sannur kærleiki. Hann liggur bara har og bíðar eftir at fáa bústað á mínum fingri.





Klivin
699 kr.



Royal
1799 kr.

# Ynskilistin hjá okkum

NÚ ER **YNSKILISTA**-TÍÐ. TÍNI KÆRU VILJA VITA, HVAT TÚ YNSKIR TÆR Í PAKKAN JÓLAAFTAN. VIT, SUM SKRIVA Í **VIKUSKIFTINUM**, YNSKJA OKKUM SJÁLVANDI EINA ØRGRYNNU (HÓAST AT VIT ALLARMEST YNSKJA OKKUM FRIÐ Á JØRÐ, REINA LUFT OG FITT BØRN) ... KANSKA FÆRT TÚ OKKURT HUGSKOT TIL TÍN **LISTA** HER:



## Inna ynskir sær ...

... glasarmband frá Rabarbuglas, tí tað er vakurt og onki er líka.

... køksvekt frá OBH Nordica. Havi umroknað alt til desilitrar nú í fleiri ár. Troytt av tí.

... naglamáttu, sum skal hjálpa bæði móti strongd og eymum vøddum. 500 kr, Siri



Siri
500 kr.



Vøruhúsið á Hjalla
399 kr.



Ullvøruhúsið
400 kr.

## Eirikur ynskir sær ...

... einar bláar heitar ullintar hosur. Altíð eitt hitt hjá mær, tí eg havi enn ongantíð átt nóg mikið av ullintum hosum, og so dámar mær væl blátt.

... 12 Easton X10 pílar við tungstensoddi, beit nock og quickspin fjarðum.





Andr. í Vágsbotni
98 kr.



Baldurs Archery Danmark
4440 kr.



## Anna ynskir sær ...

... essaysavnið Månen over porten hjá Per Petterson, tí bókin gevur innlit í, hví tað júst vóru ávísir rithøvundar, sum kveiktu hugin hjá Petterson at skriva. Essay stílurin hjá Petterson er heilt sermerktur, so eg gleði meg at lesa bókina.

... eina bók hjá Nobelvinnaranum í bókmentum Herta Muller. Havi bara lisið okkurt lítið av henni higartil, men hennara lyriski stílur er ræðandi hvassur og fekk meg at brellast eftir meir.




Rit og Rák
1800 kr.

## Heini ynskir sær ...

... stórverkið »Tankens magt«, sum í trimum bindum lýsir vesturlendska idésøgu frá antikkini og fram til 21. øld.






www.batzer.dk
198 kr.

